Rúni Nolsøe:

# - Ikki gott nokk

**HB-liðskiparin, Rúni Nolsøe, var ein vónbrotin maður eftir dystin móti Kaunas mikukvøldið, tí eftir hansara tykki kundi úrslitið verið væl betur.**

CHAMPIONS LEAGUE
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Rúni var serliga vónbrotin av byrjanini upp á dystin, har Kaunas legði seg á odda, longu tá ið ein minuttur var leiktur.

- Vit byrja øgiliga illa. Hatta var tað, sum ikki mátti henda, men vit eru allarhelst ikki 100 prosent klárur, tá ið dysturin verður bríkslaður í gongd, og tað kostar, segði Rúni Nolsøe eftir dystin.

HB-liðskiparin helt ikki, at liðið úr Kaunas var nógv betur enn føroyameistararnir, men at litavarnir vóru nógv effektivari framman fyri málinum.

- Vit skora ikki upp á teir møguleikar, ið vit hava. Tað noyðast vit at gera, tí teir skora upp á næstan allar sínar møguleikar. Eg haldi, at teir vóru rættuliga vandamiklir upp á kontra. Vit vóru væl við í dystinum og fingu eitt sindur av vón, tá ið vit skoraðu til bæði 1-2 og 2-3, men tá ið teir skora til 4-2, beint eftir at vit hava minkað um munin, haldi eg, at vit punkteraðu, segði Rúni Nolsøe.

At møguleikin fyri at røkka næsta umfarinum, Liverpool og Anfield, nú er horvin, er neyvan nakað dulsmál, og Rúni Nolsøe vísir hesum heldur ikki aftur.

- Nú ræður um hjá okkum at fara yvir til Litava og gera ein góðan figur, men vit vita, at tað verður ringt á útivølli, sigur HB-liðskiparin.



*HB-liðskiparin, Rúni Nolsøe, var als ikki nøgdur við úrslitið mikukvøldið, tí hann helt ikki, at nakar serligur munur var á liðunum báðum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA UM DYSTIN

**HB - FBK Kaunas 2-4(1-3)**
0-1 Andrius Velicka 1.
0-2 Andrius Velicka 24.
1-2 Hans á Lag 28.
1-3 Arkadiusz Klimek 34.
2-3 Hans á Lag 61.
2-4 Irmantas Zelmikas 62.
**HB:** Bárður Johannesen - Hallur Danielsen(Tór-Ingar Akselsen 60.), Johannes Joensen, Martin H. Nielsen, Janus M. Joensen - Jákup á Borg, Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Jan Larsen - Rókur av Fløtum Jespersen(Bárður Mortansson 46.), Hans á Lag(Vagnur Mohr Mortensen 73.)
**Kaunas:** Eduardas Kurskis - Tomas Kancelskis, Irmantas Zelmikas, Mindaugas Baguzis(Dainius Kunevicius 73.), Nukri Manchkhava - Eimantas Poderis, Givi Kvaratskhelia(Tadas Papeckys 46.), Giedrius Baravicius, Andrius Velicka - Arkadiusz Klimek(Arturas Rimkevicius 73.), Tomas Tamosauskas
**Gult kort:** Hans á Lag, Hallur Danielsen, Jákup á Borg, Rúni Nolsøe, Vagnur Mohr Mortensen - Nukri Manchkhava, Givi Kvaratskhelia, Eimantas Poderis, Irmantas Zelmikas
**Reytt kort:** Vagnur Mohr Mortensen
**Dómari:** Brage Sandemoen(Noreg)
**Linjuverjar:** Odd-Jarle Larsen og Jan Petter Randen
**4. dómari:** Stig Rune Krokdal
**Áskoðarar:** uml. 500

# Montoya vann á Silverstone

**Kolumbiumaðurin Juan Pablo Montoya vann formel 1 koyringina á Silverstone, og fekk endiliga gongd aftur á, eftir at hann skifti frá Williams til McLaren.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Montoya fekk sín fimta sigur, hetta var tann fyrsti síðan hann skifti frá Williams til McLaren*

Sigurin varð tikin longu í byrjanini. Takuma Sato steðgaði upp í sínum BAR-Honda, og trygdarbilurin kom á breytina í tvær umferðir, tá byrja var aftur, var Montoya á odda, hann var farin framvið Button í sjálvari byrjanini og hevði yvirhálað Alonso, áðrenn trygdarbilurin kom á breytina.. Hann gav bert oddasessin frá sær, tá hann fór í pitt at fylla bensin á. Men megnaði báðu ferð at fáa plássið aftur, tá kappingarneytarnir sjálvir fóru í pitt.

Fernando Alonso var beint í hølunum á Montoya alla koyringina, men megnaði ikki at taka fyrsta plássið, hóast hann fór í pitt aftan á Montoya báðu ferð. Hetta er ofta ein fyrimunur, tí ein við einum lættari bili kann koyra nakrar skjótar umferðir, og soleiðis sleppa sær framvið hinum bilinum. Báðu ferðirnar rendi Alonso seg í ferðslu, og var sostatt seinkaður.

Enn einaferð var tað tó finski Kimi Räikkönen, sum var størsta stjørnan. Hann koyrdi av einum tólvta plássi upp á eitt triðja pláss. Hann lá leingi aftan fyri Michael Schumacher og Jarno Trulli og misti sostatt nógva tíð. Motorurin hjá finnanum gekk fyri leygarmorgunin, og hann varð fluttur av aðru byrjunarstøðu, sum hann kvalifiseraði seg á, tíggju pláss aftur til tólvtu byrjunarstøðu. Finnin vísti eisini oddafiskinum í HM kappingini Fernando Alonso, at hann ikki skal kenna seg tryggan, tá Räikkönen yvirhálaði unga spaniumannin tvey sving áðrenn Räikkönen skuldi í pit. Hetta var ein heilt óneyðug yvirháling, men vísti Alonso hvussu lætt, tað kann gerast.

Giancarlo Fisichella í Renault koyrdi eina flotta koyring, og lá til at fáa triðja pláss, inntil hann steðgaði upp, tá hann skuldi koyri út úr pittinum aðru ferð. Hetta kostaði nógv sekund, og gav Kimi Räikkönen steypið fyri triðja pláss, og tað eyka stigið, sum heldur eitt lítið sindur meira av lívi í HM kappingini.

Júst eins og í Fraklandi, lá Jarno Trulli og hansara Toyota, sum eitt slag av proppi rættuliga frammaliga í koyringini. Jarno Trulli er ein tann besti formel 1 koyrarin, tá tað snýr seg um at koyra eina umferð í tíðarkoyringini. Tí byrjar hann altíð frammaliga. Men við einum bili, sum ikki er serliga kappingarførur, liggur Trulli og forðar og seinkar øðrum bilum, sum eru skjótari men ikki so skjótir, at teir fáa yvirhálað. Hetta gekk útyvir Michael Schumacher í Fraklandi og aftur hesuferð, men nú gekk tað eisini útyvir Kimi Räikkönen.

Trulli hevur í vikuni funnist hvassliga at Toyota liðnum fyri at vera eftirbátar, tá tað snýr seg um at menna bilin. Høvuðssniðgevin og tøkniligi stjórin hjá Toyota Mike Gascoyne hevur vart seg við, at liðið er so nýtt og óvant við at verða uppi í stuttliga endanum í kappingini, og at hetta gevur onkrar trupulleikar, men at hesir verða loystir.

19 av teimum 20 bilunum sum byrjaðu í dag komu á mál, og hetta er nærum óhoyrt.Vanliga eru tað altíð nógvir bilar, sum steðga uppi ella koyra útav. Christian Klien í Red Bull koyrdi aftur í dag fleiri ferð útav, men seinastu tíðina hevur ungi eysturríkarin koyrt so ofta útav, at hetta ikki longur er ein trupulleiki, royndirnar gera, at hann altíð megnar at fáa bilin inn aftur á breytina.

Bretin í BAR-Honda Jenson Button, fekk aðru byrjunarstøðu á heimabreytini, og nógvu fjepparnir vónaðu at síggja henda dámliga unga mannin á sigurskammilinum, men hetta varð ikki so. BAR-Honda hava ikki ein heilt kappingarføran bil, og tá allir kappingarneytarnir megna at koma á mál, so er eitt fimta pláss meira enn gott hjá Button. Eingin kundi vænta, at hann fór at blanda seg millum McLaren og Renault bilarnar.

Koyringin var nógv merkt av sorgarleikinum í London hósdagin. Trygdarátøkini vóru nógv, og øll fólk vóru kannaði, áðrenn tey sloppu inn á breytina, tó gekk hetta arbeiðið væl, og uttan stórvegis seinkingar. Okkurt av teimum bretsku liðunum hevði mála eina svarta striku á bilin, fyri at minnast tey, ið fórust í álopinum. Somuleiðis var friður hildin í ein minutt undan koyringini.

| HM fyri koyararar | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 77 |
| 2 | Kimi Raikkonen | 51 |
| 3 | Michael Schumacher | 43 |
| 4 | Jarno Trulli | 31 |
| 5 | Rubens Barrichello | 31 |
| 6 | Juan-Pablo Montoya | 26 |
| 7 | Nick Heidfeld | 25 |
| 8 | Giancarlo Fisichella | 25 |
| 9 | Ralf Schumacher | 23 |
| 10 | Mark Webber | 22 |

| HM fyri lið | |
|---|---|
| Renault F1 | 102 |
| McLaren-Mercedes | 87 |
| Scuderia Ferrari | 74 |
| Toyota Racing | 54 |
| BMW WilliamsF1 | 47 |
| Red Bull Cosworth | 22 |
| Sauber Petronas | 13 |
| Jordan Toyota | 11 |
| BAR Honda | 9 |
| Minardi Cosworth | 7 |

| Nr. | Koyrari | Land | Bilslag | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren-Mercedes | |
| 2. | Fernando Alonso | Spania | Renault | 2,7 sekund |
| 3. | Kimi Räikkönen | Finnland | McLaren-Mercedes | 14,4 sekund |
| 4. | Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 17,9 sekund |
| 5. | Jenson Button | Ongland | BAR-Honda | 40,2 sekund |
| 6 | Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 75,3 sekund |
| 7. | Rubens Barrichello | Brasilia | Ferrari | 76,5 sekund |
| 8. | Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 79,2 sekund |
| 9. | Jarno Trulli | Italia | Toyota | 80,8 sekund |
| 10. | Felipe Massa | Brasilia | Sauber-Petronas | 1 umferð |
| 11. | Mark Webber | Avstralia | Williams-BMW | 1 umferð |
| 12. | Nick Heidfeld | Týskland | Williams-BMW | 1 umferð |
| 13. | David Coulthard | Skotland | Red Bull Racing | 1 umferð |
| 14. | Jacques Villeneuve | Kanada | Sauber-Petronas | 1 umferð |
| 15. | Christian Klien | Eysturríkið | Red Bull Racing | 1 umferð |
| 16. | Takuma Sato | Japan | BAR-Honda | 2 umferðir |
| 16. | Tiago Monteiro | Portugal | Jordan-Toyota | 2 umferðir |
| 17. | Christijan Albers | Holland | Minardi-Cosworth | 3 umferðir |
| 18. | Patrick Friesacher | Eysturríkið | Minardi-Cosworth | 4 umferðir |
| 19. | Narain Karthikeyan | India | Jordan-Toyota | (kom ikki á mál) |